# Hugtikin fiskimálaráðharri

**Løgmaður, Jóannes Ejdesgaard, sum var vertur við morgunmatarborðið fríggjamorgunin, sigur, at Ben Bradshaw var ógvuliga áhugaður í øllum, sum hevur við Føroyar at gera**

VITJAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Tað var í allar besta veðri, at bretski fiskimálaráðharrin og tey fýra embætisfólkini, sum eru við honum á ferðini í Føroyum, fríggjamorgunin møttu úti í Tinganesi til morgunmatarborð saman við Jóannesi Ejdesgaard, løgmanni og hansara fólkum.

Til borðs í Skansapakkhúsinum saman við Jóannesi Ejdesgaard og bretska fiskimálaráðharranum, Ben Bradshaw, sótu eitt nú Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharri, Herálvur Joensen, aðalstjóri í Fiskimálaráðnum, John Rajani, sendimaður Føroya í Bretlandi, Kate Sanderson og ríkisumboðsmaðurin, Birgit Kleis.





*Bjørn Kalsø, Jóannes Eidesgaard og Ben Bradshaw*

### Hugtikin maður

Í túninum í Tinganesi tóku vit í hondina á Ben Bradshaw og spurdu, hvørja fatan hann hevur fingið av Føroyum á higartil stuttu vitjanini?

- Eg havi ikki verið í Føroyum áður, men eg havi longu heft meg við, at tit hava eitt ógvuliga vakurt land. Landslagið og vøkru litirnir fella í eyguni, og eg eri ógvuliga hugtikin av tí, eg higartil havi sæð.

Ben segði seg eisini hava heft seg við, at í Føroyum sært tú bæði tað nýggja og tað gamla.

- Eg eri hugtikin av gomlu bygningunum, eg havi sæð her úti í morgun, segði Ben Bradshaw, sum annars segði seg vera spentan uppá vitjanina í Klaksvík, haðani leiðin bar úr Havn við Brimli.

Tað var okkara heimligi fiskimálaráðharri, Bjørn Kalsø, sum fylgdi bretska starvsbróðrinum heimeftir bryggjuni og yvir á eystaru vág, har Brimil lá.

Bussur stóð til reiðar at koyra tey, sum skuldu við Brimli, út á bryggjuna, men her avgjørdu fiskimálaráðharrarnir báðir heldur at ganga yvir um vánna.

### Stutt prát

Løgmaður, Jóannes Ejdesgaard, sum var vertur við mongunmatarborðið, sigur, at Ben Bradshaw var ógvuliga áhugaður í øllum, sum hevur við Føroyar at gera.

- Hann helt, at føroyskir fiskimenn hava eina góða fiskiveiðiskipan og helt eisini, at myndugleikar og vinna standa nærri hvørjum øðrum í Føroyum enn eitt nú í Bretlandi, har langt kann tykjast vera millum partarnar.

Jóannes sigur, at tey frá føroyskari síðu greiddu bretska fiskimálaráðharranum frá, hvussu nógv fiskivinnan fyllir í okkara samfelag í mun til í øðrum londum, og hvussu stóran týdning hon hevur.

- Ben segði, at fiskimenn í Bretlandi og øðrum ES-londum fýlast á, at fiskivinnan verður stýrd so sentralt. Teir halda, at neyðugt verður í størri mun at desentralisera stýringina.

Løgmaður sigur, at hann vísti á, at tað nevniliga er sentraliseringin av stýringini, sum eitt nú føroyingar, norðmenn, íslendingar og grønlendingar ræðast mest við ES.

- Vit stúra nevniliga fyri suverenitetinum á fiskivinnuøkinum, um vit leggja okkum nærri at ES, segði Jóannes Ejdesgaad á stutta morgunfundinum í Tinganesi fríggjamorgunin.

### Vitjan í Klaksvík

Umborð á Brimli á veg til Klaksvikar skuldu starvsbrøðurnir úr Bretlandi og Føroyum, Ben og Bjørn, tosa um fiskiveiðiskipanina við Føroyar, sum útlendingar hava víst stóran áhuga.

Tá ið Brimil kom til Klaksvíkar, varð vitjað á Kósini og hjá JFK-Trol, har kunnað varð um virksemið.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, var vertur við eina máltíð í býráðshøllini, og klokkan 15.15 var tíðindafundur í Klaksvík, har báðir fiskimálaráðharrarnir vóru við.

Eftir fundin gekk leiðin aftur til Havnar við Brimli, og á ferðini suður greiddi Bogi Hansen frá um veðurlagsbroytingar í Norðurhøvum.

Í gjárkvøldið var Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, vertur fyri einum døgurða í Listaskálanum.

---

Landsbankin og Hagstovan:

# Leggjast saman í ein stovn

**- Búskaparliga vitanin í fyrisitingini skal gagnýtast betur, og tí verða Landsbanki Føroya og Hagstova Føroya løgd saman í ein sterkan felags stovn, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í tíðindaskrivi, sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, at landsstýrið hevur sett sær fyri at savna spjaddar fyrisitingarligar eindir í størri eindir og at gagnnýta vitanina, sum mangan er spjadd í fyrisitingini, betur enn nú.

- Í hesum sambandi er semja um at leggja saman Landsbanka Føroya og Hagstovu Føroya í ein nýggjan og sterkari felags stovn, sigur hann.

Bárður vísir á, at hetta stig verður tikið samsvarandi hugsanini hjá landsstýrinum um, at okkara fyrisiting – í mun til støddina av samfelagnum – er skift ov nógv sundur í ov smáar fyrisitingarligar eindir.

- Í høvuðsheitum hava fylgjandi stovnar hjá landinum búskaparfrøðingar í starvi, sum fáast við makrobúskap: Landsbanki Føroya, Hagstova Føroya, Búskaparráð Føroya og Søgu- og Samfelagsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya.

Bárður sigur, at landsstýrið vil gagnnýta tøku búskaparligu vitanina betur, og tí er semja í landsstýri og samgongu um, at Landsbankin og Hagstovan leggja saman í ein stovn.

- Ein onnur orsøk til at leggja hesar stovnar saman er, at í Føroyum vanta hagtøl í stóran mun.

Fíggjarmálaráðharrin vísir á, at øll framkomin lond hava t.d. ein tjóðarroknskap í føstum prísum, men Føroyar hava ongan. Hagtalsgrundarlagið er eisini í aðrar mátar óvist og byggir fyri stóran part á metingar.

- Henda støða er ikki nøktandi, men endamálið er, at tann nýggi og fakliga sterki stovnurin, ið spyrst burtur úr samanleggingini av Landsbankanum og Hagstovuni, skal fáa hesi viðurskifti í rættlag.

Bárður sigur, at í samband við samanleggingina skulu ymsar uppgávur loysast og ein stýrisbólkur, mannaður við leiðandi embætisfólkum, skal standa fyri samanleggingararbeiðnum. Hann heldur hóskandi vera, at aðalstjórin í Fíggjarmálaráðnum saman við stjórunum í Landsbankanum, Hagstovuni og Gjaldstovuni manna stýrisbólkin.

- Í arbeiðnum at leggja Landsbankan og Hagstovuna saman, skal støða eitt nú takast til reglur fyri nýggja stovnin, leiðsluviðurskifti og setan av nevnd ella ráði oman fyri stovnin. Arbeiðsuppgávur skulu býtast millum starvsfólk á nýggja stovninum, og hølisviðurskiftini skulu eisini umrøðast, sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri í tíðindaskrivi.



Ilt er komið í Postfelagið:

# Bergur hóttir egin starvsfólk

**Sunleif Højgaard, formaður í Postfelagnum, er alt annað enn nøgdur við framferðarháttin hjá postverksstjóranum í samband við sparingarnar. – Starvsfólkið livir undir støðugum uppsagnarhóttanum, og tað kann ikki góðtakast, sigur hann**

POSTVERKIÐ
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Tað, sum serliga øsir okkum upp, er viðferðin, sum hetta málið hevur fingið. Tað hevur verið viðgjørt í øllum miðlunum, áðrenn starvsfólkið hevur fingið nakað sum helst at vita, greiðir Sunleif Højgaard frá.




*Sunleif Højgaard, formaður í Postfelagnum, er ógvuliga ónøgdur við framferðarháttin hjá Bergi í Garði, postverksstjóra. – Tað líkist ongum, at starvsfólkini hjá Postverkinum skulu frætta um sínar egnu uppsagnir í miðlunum, sigur hann. Sunleif Højgaard dugir heldur ikki at síggja hvar starvsfólk kunnu sparast, uttan at tað kemur at merkjast á tænastuni framyvir*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Rúkandi ósamd við stjóran

Fyrstuferð, at starvsfólkið hjá Postverkinum frætti nakað um sparingar og niðurleggingar av smáu deildunum kring landið, var ígjøgnum miðlarnar.

– Eg haldi tað vera forkastiligt, at limirnir hjá okkum skulu lesa í bløðunum um sína egnu uppsøgn. Tey hava verið undir eini støðugari arbeiðsloysishóttan seinastu tíðina, og hava ikki vitað um tey eru keypt ella seld. Tað líkist veruliga ongum, staðfestir Sunleif Højgaard.

Hann sigur seg eisini vera ósamdan við postverksstjóran, tá hesin í miðlunum hevur sagt, at Postverkið saktans kann spara, til dømis við at niðurleggja nakrar deildir á bygd.

– Hann fær tað at ljóða, sum tað eru alt ov nógv fólk til arbeiðis, og at tað tí ikki kemur at merkjast um nøkur teirra hvørva. Við øðrum orðum, at tað eru fleiri av starvsfólkunum, sum gera eitt nyttuleyst arbeiði. Hetta er ikki rætt, heldur Sunleif Højgaard.

Hann sigur, at tað longu er rættiliga nógv spart, og at tað als ikki eru ov nógv fólk til arbeiðis á Postverkinum.

– Sjálvsagt kann hann rationalisera onkustaðni, men tað er heilt víst, at tað kemur at merkjast aftur, staðfestir Sunleif Højgaard

### Politikararnir taka støðu

Sunleif metir, at Postverkið er ein tænasta til landsins borgarar á sama hátt, sum til dømis Strandferðslan er tað. Tí heldur hann tað vera púra burturvið, at Postverkið ongan stuðul skal fáa.

– Um vit ikki fáa nakran stuðul, so má tað sjálvandi sparast onkustaðni. Eg dugi bara ikki at síggja hvar tað skal vera. Postarbeiðið er eitt týdningarmikið arbeiði, sum skal gerast, og sum alt annað, so kostar tað pengar, sigur Sunleif.

Hann sigur, at hetta er ein politiskur spurningur. Um eingin játtan verður givin, mugu politikararnir gera sær greitt, hvat teir vilja við postfelagnum.

– Nú verður tosað um at gera tað til eitt partafelag. Men so mugu politikararnir eisini gera sær greitt, at við tí frásiga teir sær rættin til at ávirka avgerðirnar, sum verða tiknar. Verður Postfelagið umskipað, fer tað ikki at verða møguligt hjá teimum at ávirka lokalpolitiskt, staðfestir Sunleif.

Hann sigur, at Postfelagið hevði gott samstarv við undanfarnu samgongu, men at núverandi samgonga ikki hevur latið frættað frá sær.

– Vit høvdu góðar samráðingar um, hvussu alt skuldi tillagast. Spariætlanirnar skuldu útførast so lagaliga sum gjørligt, so tað ikki kom sum eitt stórt skrædl. Men nú fáa vit bert fráboðanir í pressuni, um at so og so nógv fólk missa starvið. Tað kennist, sum vit verða hótt, sigur hann.

Hann heldur eisini, at so leingi sum stuðul ikki verður latin, fer trupulleikin bert at verða fluttur runt á ymisku deildirnar á Postverkinum.

– Nú bygdaavgreiðslurnar eru blivnar friðaðar av lokalpolitikarunum, verður trupulleikin bert sendur víðari til miðstaðarøkið. Og tað er heilt víst, at tey í Havn heldur ikki verða fegin um at fáa uppsagnarhóttanina yvir seg, staðfestir hann.

### Góða tænastu

Postverkið hevur veruliga verið í andglettinum hesa seinastu tíðina, og er millum annað blivið skuldsett fyri ikki at megna at fylgja við nýggju tíðini. Tænastur, sum Postverkið áður hevði einarætt uppá, eru nú mestum heilt yvirtiknar av privatum feløgum, og tað hevur í stóran mun verið at sæð aftur í pengingakassanum. Høgu takstirnir hjá Postverkinum hava fingið stóran part av skuldini.

Spurdur um hesar mongu ákoyringarnar, millum annað um dýra útbering, svarar Sunleif, at tað hevur sína góðu grund.

– Vit hava vaksið fólk í arbeiði, sum eru álítandi og gera sítt arbeiði til lítar, og vit kunnu ikki lata tey arbeiða til undirprís. Hesi nýggju útberarafeløgini hava bert børn og hálvvaksin í arbeiði. Tey hava nógv lægri lønarútreiðslur, og tí kann tað ikki samanberast, heldur hann.

Hann sigur, at Postverkið altíð hevur veitt eina góða tænastu, men nú stóru sparingarnar verða framdar, fer tað allarhelst at merkjast á starvsfólkatalinum, og harvið eisini á tænastuni.

– Eg eri greiður yvir, at nakrir av okkara limum nokk missa arbeiðið. So leingi, sum eingin stuðul verður latin okkum, er einki at gera við tað. Vit halda bara, at hesin framferðarhátturin má halda uppat nú. Tað gongur ikki, at hvørjaferð vit skeita í eitt blað, ella tendra út- og sjónvarpið, at vit so skulu hoyra hesar uppsagnarhóttanirnar, uttan at vita nakað um tað frammanundan, sigur Sunleif.

Víðari sigur hann, at tað enn ikki hevur verið nakar fundur við postverksstjóran um hetta málið.

– Tey flestu arbeiðspláss høvdu havt ein fund við arbeiðsfólkið, áðrenn tað bleiv farið út til pressuna at tosa um uppsagnir. Fyri líkasum at fingið eina smidligari gongd í málinum. Tað vóna vit, at stjórin framyvir fer at gera, sigur Sunleif Højgaard at enda.

## Stórt torgtiltak við Mentanarhúsið í Fuglafirði

Í dag 25. sept. verður stórt torgtiltak við Mentanarhúsið í Fuglafirði við eitt nú bilaframsýning, tombola, matsølu, meksikanskari uppboðssølu, ponyríðing og el-bilum

Í sambandi við at tað er langur leygardagur í Fuglafirði í dag, og handlarnir hava opið til kl. 17.00, skipa ÍF, ÍF-stuðlar og Fuglafjarðar Svimjifelag fyri stórum torgtiltakið við Mentanarhúsið í Fuglafirði. Tiltakið byrjar kl. 10.00 og endar kl. 16.30.

Í gomlu Toystovuni verður matsøla og fiskibrunnur. Café, tombola og søla av ballónum verður í Mentanarhúsinum, meðan go-cart og smáir el-bilar verða uttan fyri Mentanarhúsið. Svimjifelagið hevur eisini ponyríðing verður niðan fyri Tasjuna.

Eisini fer Reyni Service, sum er ein av høvuðsstuðlunum hjá 1. deildarliðnum hjá ÍF, at hava bilaframsýning á torginum uttan fyri Mentanarhúsið. Har fara teir at vísa fram nýggjastu sniðini, og hava vitjandi eisini møguleika at royndarkoyra onkrar av nýggju bilunum hjá Reyni Service.

Kl 15.00 skipar Svimjifelagið fyri stórari meksikanskari seyðasølu uttan fyri Mentanarhúsið. Allan dagin fer Haraldsen at bjóða ókeypis smakkiroyndir.

Um veðrið ikki er til vildar leygardagin, verður tiltakið í Mentanarhúsinum.

Familjutiltak við gandakallinum MR. Mox

Kl. 17.00 leygardagin skipa ÍF-stuðlar fyri forvitnisligum familjutiltakið við danska gandakallinum MR. Mox. Mr. Mox hevur seinastu 10 árini ikki gjørt annað, enn at undirhildið ymsastaðni í Danmark, og við sínum serligu evnum at undirhalda við gandi bæði fyri børn og vaksin og skemti hevur hann havt sýningar í Danmark fyri fullum húsi. Atgongumerki á 60,- fáast hjá Haraldsen og í FK í Fuglafirði, og annars við dyrnar hálvan tíma áðrenn sýning.

ÍF-stuðlar heilsar øllum vælkomnum til Fuglafirðar í dag.